# Farliga forbindelser

**Høvundur**: Christina Gottfridsson (svensk).

**Leiksøga**: *Farliga forbindelser* er ein ungdómsleikur, sum snýr seg um tey fyrstu ungdómsárini: Áhugin fyri hinum kyninum er vaknaður, hvussu skal man vera, smædni, reyp, ótryggleiki … ein línudansur, ið krevur sín mann.

Leikurin leggur upp til improvisatión, t.v.s. tað verða givin nøkur hint, sum tey, sum arbeiða við leikinum kunnu fara víðari við – longri ella styttri - tað er upp til ein sjálvan. Hetta er ein spennandi avbjóðing fyri ein ungdómsbólk. Leikurin er viðkomandi og snýr seg um ung beint nú.

Leikurin er ikki naturalistiskur, heldur meira yvir í tað abstrakta, og gevur hetta óendaliga nógvar spennandi møgurleikar.

**Pallmynd**: Leikurin er bygdur upp í 14 senum. Nógvur tónleikur er í leikinum og spælir ein stóran leiklut.

**Leikarar**: 2 gentur og 2 dreingir spæla 17 ymiskar leiklutir.

| | |
|---|---|
| Moster Malla | (drongur) |
| Tøs Chatreuse | (genta) |
| Långa Doc | (drongur) |
| Cousine Sandrine | (genta) |
| Miss Missy | (genta) |
| Chicky Micky | (drongur) |
| Villetta Valmontsson | (genta) |
| Liz Plizetta | (genta) |
| Bule Børje | (drongur) |
| Bøna B. | (drongur) |
| Man Minsann | (drongur) |
| Lyppasine | (genta) |
| Wayne Payne | (drongur) |
| Lensam | (genta) |
| Ærtan Bærtan | (genta) |
| Snofsan Dofsing | (genta) |
| Suma Buckla | (drongur) |

***Leikurin er skrásettur hjá MÁF.***